# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um høgt elskaðu ommu mína Hannelinu Joensen, Gjógv

**fødd 5. desember 1937 – deyð 24. mars 2006**



*Góða, elskaða omma!*

*Eg elski teg, omma.*
*Tað veitst tú, omma, at eg geri,*
*tí eg veit, at tú elskaði meg.*

*Tú dugdi so væl at vísa kærleikan.*

*Omma, hví skuldi tað verða tú?*
*Omma, hví skuldi tað akkurát verða tú?*
*Eg vil hava svar upp á tað*
*men nei, tað skuldi eg ikki.*

*Men eg hevði viljað tað,*
*men nei, tað skuldi eg ikki.*

*Eg minnist, at tú altíð bað hesa bønina,*
*tá tú og eg svóvu saman:*

*Jesus ver tú Jesus mín*
*Jesus lat meg verða tín*
*Jesus ver tú álit mítt*
*í hesa nátt og altíð*
*Amen*

*Eg kann skriva so nógv,*
*sum ikki kann sigast við orðum.*

*Tú veitst, at eg elski teg,*
*tí eg veit, at tú elskaði meg*

**Seinasta heilsan**
**Elsa**

***Líka so nógv tú elskar***
***Líka stór er sorgin.***

# Benny Drewsen 70 ár



Í dag, mikudagin 6. desember, fyllir Benny Drewsen, búsitandi í Skovlund í Jútlandi, 70 ár.

Hóast Benny er dani, verður hann roknaður sum føroyingur, tí her hevur hann búð mesta partin av lívi sínum.

Benny er føddur og uppvaksin í Keypmannahavn. Hann eigur ein tvíburabeiggja, sum býr í Suðursælandi, meðan yngsti beiggin býr í Keypmannahavn.

Sum ungur sigldi Benny úti, til hann fekk starv á skrivstovu hjá DFDS í Keypmannahavn. Í 1965 giftist hann við Esther Nolsøe úr Havn, og fluttu tey til Føroyar at búgva í 1966 og búsettust í Havn. Fyrstu tíðina arbeiddi hann á minkagarðinum í Hoydølum, til hann fekk starv í handlinum "Radio-El" hjá William Sloan.

Hann byrjaði seinni sum sjálvstøðugur og leigaði seg inn í handilin hjá Masu og Herluf Arnason í Tórsgøtu, har hann seldi ymiskar lutir, sum hann sjálvur hevði gjørt.

Hann spesialiseraði seg í postalínsmáling við føroyskum motivum, sum hann málaði á koppar, tallerkar, krukkur, vasar o.s.fr. Hann undirvísti eisini í postalínsmáling heima.

Tá Masa og Herluf góvust, nýtti hann allan handilin til hetta endamál og seldi m.a. málningar, tekningar og myndir, alt sum hann sjálvur hevði gjørt. Handilin stóð á horninum Sverrisgøta/Tórsgøta, har sum parkeringsøkið hjá P/F Mariu Poulsen í miðbýnum er í dag.

Benny hevur góð listarlig evnir, sum hann brúkar til fulnar. Hann er sera musikalskur, spælir á munnhørpu og klaver og er ein av teimum heilt fáu sum dugir at spæla upp á sag (hondsag). Hann hevur eisini sungið í Ebenezer-kórinum.

Benny var tann, sum byrjaði við frítíðararbeiðinum í Ebenezer í 60-unum, sum var nakað heilt nýtt tá. Hann hevur eitt lætt sinni og hevur altíð dugað sera væl við teimum ungu. Hann hevur verið fleiri túrar saman við øðrum í Rumenia við neyðhjálp og eigur nógv vinfólk eystanfyri.

Í dag hava Esther og Benny hava eina íbúð í Skovlund, nærhendis Varde í Jútlandi, og hús í Havn. Benny er mest niðri, tí hann livir betri í danska veðurlagnum. Tey eiga trý børn, Svend Åge, sum býr í Hoyvík, Eyðfinn, sum býr í Kollafirði, og Anitu, sum býr í Havn. Barnabørnini er fýra í tali.

Sangbólkurin Vitin:

# Til Danmarkar at syngja



Levi Joensen skrivar: Tankar mínir eru hjá tykkum, sum búgva í Jyllandi, hjá øllum tykkum eg eri komin at kenna síðani 1983. Mong eru flutt, summi til Føroya onnur eru nýliga komin til Danmarkar. Afturímóti tá ið vit eru heima og nærum ikki kenna hvønn annan, broytist hetta uttanlanda og vit hugsa um hvussu føroysk vit eru, og í tí fremmanda landinum vaknar hetta føroyska í okkum og dregur okkum saman, tí vit eiga eitt føðiland móti norði, ið vit elska.

Mong av okkum hava verið í Danmark í áravís, til tykkum øll vilja Gretha og eg senda okkara bestu jólaynski um eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár. Tit sum kenna Grethu og meg, vita um verkið vit hava staðið fyri hesi mongu ár. Tey seinastu 5 árini hava vit fingið eina góða vitjan í desember mánaða. Undan jólum hevur sangbókurin Vitin úr Betesda í Klaksvík vitjað, og hava teir lyft okkum upp, tá teir hava sungið um Harran Jesus Kristus við teirra vøkru røddum.

Í ár vera teir ikki færri enn 12 mans, sum spæla, syngja og tala fyri okkum. Byrjað verður í "Sædding Center Esbjerg" 15. des. kl. 19.30, haðani gongur leiðin „nord over" til Hirtshals, har vit vera á Motel Nordsøen 16. des. kl. 15. Víðari fara vit til Aalborg sama dag og vera í Bethaniakirkjuni, Dag Hammerskjöldsgade 2 kl. 20. Endað verður í Vejle, Staldgårdsgade 4, 17. des. kl. 17.

Vitin verður við á øllum hesum fundum, eisini verða vitnisburðir við Levi og fleiri. Eftir allar fundirnar borðreiða vit við føroysjum viðskera, Rís àlamande og børnini fáa karamellur, so hetta skuldi verið lívgandi fyri okkum øll.

Bøn okkara er, at vit síggja so mong sum til ber. Øll eru hjartaliga vælkomin, serliga tey sum koma á fyrsta sinni, vælkomin øll somul.

Vitin og vit allir, senda okkara bestu heilsanir í navni Frelsarans, við bøn um nakrar góðar løtur saman.

**Klaksvík 24. nov.2006**

**Levi Joensen**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i